IRF
*– heilt og reint*

# Avloysarar til IRF summarið 2007

Søkt verður eftir fólki til fylgjandi virksemi hjá IRF í summarfrítíðini 2007:

- innsavning av husarhaldsruski
- koyring av burturkasti
- innsavning av rottangaevju
- innsavning við slammsúgvara.

Arbeiðsøkið er í øllum limakommununum norðanfjørðs.

Tíðarskeiðið er frá seinast í juni til miðjan august.

Umsøkjarar, sum hava stóra koyrikortið, hava fyrimun.

Áhugaðir umsøkjarar venda sær til:
Adelbert Ellingsgaard á telefon 414243.

Umsóknarfreist 18. mai 2007.

IRF er ein interkommunalur renovatiónsfelagsskapur sum innsavnar og viðgerð rusk, burturkast, evju og slamm úr 33 limakommunum.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

# Biologassistentur

Søkt verður eftir avloysara fyri biologassistent, sum fer í farloyvi 1. juni í ár, á fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni. Starvið verður sett fyri 1 ár.

Høvuðsuppgávurnar á fiskideildini eru at gera rannsóknir og savna inn tilfar (lívfrøði, veiða, roynd v.m.), soleiðis at stovnurin verður førur fyri at meta um tilfeingið í sjónum og við støði í hesum metingum at ráðgeva um skilagóða troytan av hesum tilfeingi.

Arbeiðið sum biologassistentur er m.a. prøvataking á landi og sjógvi og praktiskar fiskiroyndir, herundir sigling við Magnusi Heinason og leigaðum førum, telduføring og rættlestur av úrslitum v.m.

Hóskandi er, at umsøkjarar hava útbúgving frá fiskivinnuskúla, navigasjónsskúla ella líknandi. Royndir innan fiskivinnuna hava týdning.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Umsóknarfreistin er 21. mai 2007. Umsóknir við prógvum, yrkisgongd (curriculum vitae), viðmælum o.ø skulu sendast til Fiskirannsóknarstovuna, Postrúm 3051, Nóatún 1, FO 110 Tórshavn.

Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna á tlf. +298 353900.

# SKRIVSTOVUSTARV

Hjá politinum í Havn er eitt fast skrivstovustarv leyst at søkja.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna og verður fyribils skipað soleiðis:

Mánadag til og við hósdag frá kl. 10.00 til kl. 16.00 og fríggjadag frá kl. 09.00 til kl. 15.00.

Starvsøkið fevnir um alt skrivstovuarbeiði hjá politinum, har høvuðsuppgávan fyribils verður at passa telefonumstillingina hjá politinum í Havn – tlf. nr. 351448.

Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella royndir í skrivstovuyrkinum.

Starvssetanin er eftir sáttmálanum millum HK/STAT og danska fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á tlf. 351448.

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda landfútanum, Smyrilsvegur 20, postboks 3018, 110 Tórshavn.

Tann, sum settur verður, hevur møguleika at fáa økt arbeiðstíðina við 5 tímum um vikuna í tíðarskeiðinum 1. mai til 31. oktober 2007.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 27. apríl 2007

Karen Marie Olesen

## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

**Søkt verður eftir**

# REINGERÐINGSHJÁLP

Søkt verður eftir reingerðingshjálp 30 tímar um vikuna at byrja skjótast ella eftir nærri avtalu.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Jyttu Juul, reingerðingsleiðara, tlf. 215250

Umsókn, saman við møguligum viðmæli v.m. skulu sendast til

**Eysturoyar Røkktar – og ellisheim**
Friðartún
620 Runavík
att: fyristøðumaðurin

og verða okkum í hendi innan 10.05.07, kl. 12.00



# Til Sølu

Ford Focus 1,8 diesel.
Í góðum standi
Árg. 7/99. kr. 78.000,-
Útgjald einans kr. 24.000,-
Restina práta vit um

**Bilfríðkan á Hjalla**
**Tlf. 21 73 00**

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini í Froðba

Útskiftingin av uttangarðs í Froðba varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Trongisvági 30. apríl 2007. Hesin úrskurður verður latin til ákæru frá 30. april 2007 sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Eftir kap. 9 kunnu útskiftingin og úrskurðurin hjá útskiftingarnevndini kærast til yvirútskiftingarnevndina, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 30. apríl at rokna. Kærufreistin er úti 30. juli 2007.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, Postboks 28, C. Pløyensgøta 1, 110 Tórshavn.

Útskrift úr gerðabókini og skjøl liggja frammi hjá Tvøroyrar kommunu og á Matrikulstovuni, til kærufreistin er úti.

Útskrift úr gerðabókini, skjøl og endurprent av kap. 9 »Anke og Gennemsyn« í útskiftingarlógini eru at síggja á heimasíðuni hjá Matrikulstovuni, www.matrikul.fo.